Halgir Winther Poulsen, advokatur, um Jógvan S avgerð:

# Grovt brot á rættartrygdina

**At tilsøgnin um veiðiloyvi hjá Sp/f Nakki verður tikið aftur, má hava við sær, at øll hini 32 loyvini, sum vórðu givin eftir somu treytum, verða tikin upp aftur til nýggja viðgerð og møguliga tikin aftur. Alt annað er grovt brot á rættartrygdina, sigur Halgir Winther Poulsen, advokatur**

JÓGVAN S MÁLIÐ
*Rúnar Reistrup*



- Hetta er eitt sindur verri enn tað, sum vit higartil hava upplivað. Dómurin verður útintur, uttan at maðurin fær høvi at siga sína meining. Tað plaga vit ikki at gera her um okkara leiðir, sigur Halgir Winther Poulsen, advokatur, spurdur um hvussu grovt hann metir avgerðina hjá fiskimálaráðnum um at taka tilsøgnina um veiðiloyvi hjá Sp/f Nakki aftur, gera seg inn á rættartrygdina hjá einstaka borgaranum.

Í umbidnu frágreiðing síni um sonevnda Jógvan S málið, sum Halgir Winther Poulsen læt fiskimálaráðharranum mánadagin 4. august, skrivar advokaturin, at eftirsum at landsstýrismálanevndin byggir sína avgerð um Jógvan S málið á, at atlitini, ið lógu til grund fyri avgerðini um at játta tilsøgn um veiðiloyvi vóru ósaklig, má tað merkja at øll hini 32 málini, sum hava verið viðgjørd út frá sama grundarlagi, eisini hava verið viðgjørd á ein ósakligan hátt. Tí mugu øll hini 32 málini um flyting av veiðiloyvum eisini takast upp av nýggjum og møguliga takast aftur, um loyvi hjá Sp/f Nakki verður tikið aftur, skrivar advokaturin.

»Verður tað hinvegin ikki gjørt, og verður loyvið til Sp/f Nakk tikið aftur, gera myndugleikarnir seg sekar í grovum broti móti javnrættindum borgaranna«, stendur at lesa í frágreiðingini hjá Halgir Winther Poulsen. Fiskimálaráðharrin, Jacob Vestergaard, valdi mikukvøldið at taka tilsøgnina um veiðiloyvið hjá Sp/f Nakki aftur, eftir trýsti frá landsstýrismálanevndini.

# Teistin klárur í august

**Strandfaraskipið Teistin, sum siglir millum Gomlu Rætt og Skopun, hevur ikki verið í sigling síðani 5. mai. – At eitt skip er úr sigling so leingi er ikki rímiligt, sigur stjórin á Strandferðsluni, Kristian Davidsen, sum tó hevur fingið lovað, at skipið verður klárt at taka í sigling aftur áðrenn 1. september**

STRANDFERÐSLAN
*Ingrid Bjarnastein*



*Teistin hevur verið úr sigling síðani 5. mai í ár. Strandferðslustjórin hevur tó fingið lovað, at hann verður klárur at taka í nýtslu aftur áðrenn 1. september*

Nýggjasta skipið í flotanum hjá Strandfaraskipum Landsins, Teistin, hevur verið burtur úr sigling síðani 5. mai í ár. Nú skriva vit august, og skipið er framvegis á turrum á Skipasmiðjuni á Skála.

Talan er um góðar tríggjar mánaðar, at skipið hevur verið burtur úr sigling, og metir stjórin á Strandferðsluni, Kristian Davidsen, ikki, at hetta er rímiligt.

– At eitt skip er so leingi burtur úr flotanum kann ikki góðtakast í sær sjálvum, sigur hann.

### Bógskrúva

Í løtuni verður bíðað eftir einum luti til bógskrúvuna, so hon kann rigga sum hon skal. Talan er um eina stýring til ein elektromotor, sum ger, at bógskrúvan kann brúka fulla virkt.

– Hetta er ein garantitrupulleiki, sum skal rigga. Vit vóru ein royndartúr við Teistanum fyri tveimum ella trimum vikum síðani, og tað riggar ikki heilt við el-skipanini á skipinum. Tá var spurningurin so um vit skuldu seta Teistan aftur í sigling fyribils, men vit hava gjørt av, at bíða til Teistin siglir sum hann skal, greiðir strandferðslustjórin frá.

Ein av orsøkunum til, at arbeiðið hevur drigið út er verkfallið, sum var fyrr í vár. Skipasmiðjan á Skála hevur eisini havt trupulleikar við at fáa el-skipanina at rigga.

– Vit hava heitt staðiliga á Skipasmiðjuna um at fáa arbeiðið liðugt, og vit hava fingið lovað, at tað verður í august, so áðrenn 1. september verður Teistin aftur í sigling, sigur Kristian Davidsen.

Meðan Teistin hevur ligið á turrum hevur Ternan røkt siglingina um Skopunarfjørð.

– Ternan klárar at nøkta tørvin um summarið tá veðrið er gott. Tað er eisini ein av orsøkunum til at vit vilja hava Teistan áðrenn veturin kemur og veðrið verður verri. Tá vit hava fingið skipið aftur, verður ein eftirmeting gjørd, og vitað verður, hvat kundi verið gjørt betri, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni at enda.



*Á Skipasmiðjuni á Skála verður arbeitt við at fáa nýggjasta skipið í flotanum hjá Strandfaraskipum Landsins aftur á sjógv*





listastevna føroya arts festival

# Høgt flúgvandi list

**Listastevnan 2003 sett, og ellivu yrkjarar virðisløntir**

SETAN
*Heri á Rógvi*



*Birgir Kruse fær handað Tingakrossin sum sýmbol uppá, at hann, sum umboð fyri Tórshavnar kommunu, verður formaðurin fyri Listastevnuna 2004.*
*Mynd: Maria Olsen*

Kanska tað vóru fleiri tóm setur enn fólk við setanina av Listastevnuni. Í ár varð setanin hildin í kykmyndamyrkrinum í Havnar Bio. Orsøkin til kykmyndahøllina var, at ein filmur skuldi sýnast, og Le Cirque Invisible er ikki so at skumpa av pallinum í Norðurlandahúsinum.

Setanin í ár var fyri eyga og oyra nógv minni spennandi enn í fjør. Tað kann undran ein, at tað ikki verður gjørt meira burturúr og kanska meira alment, at Listastevnan, sum størsta árliga mentanartiltak fer av bakkastokki.

Á skránni vóru røður frá mætum fólkum. Stjórin fyri Norðurlandahúsið bjóðaði vælkomin og segði nøkur um stevnuna.

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Høgni Hoydal, setti sjálva Listastevnuna. Hann legði í røðu sínari stóran dent á, at tað var mentanin, sum gjørdi tað liviligt í Føroyum.

Hann byrjaði røðu sína við at siga frá, at landafrøðingurin Hans Holm einaferð hevði sett sær fyri at finna annað stað í heiminum, sum líktist Føroyum sum mest. Hann fann tvey onnur støð. Munurin var tann, at tað var bara í Føroyum, at tað búðu fólk.

Og Høgni Hoydal segði seg vera ernan av, at tað var so livilig, spennandi og ríkt í Føroyum við so góðari og fjøllbroyttari mentan.

### 11 yrkjarar

Í hesari kappingini er tað ikki, sum við flestum øðrum kappingum, at tað bert er ein vinnari.

Høgni Djurhuus, limur í dómsnevndini í yrkingakappingini, var væl upplagdur við setanina, og orðini fullu væl frá honum.

Saman við Kim Simonsen og Bergljót av Skarði hevur hann mannað eina dómsnevnd, sum skuldi velja út millum innsendar yrkingar í eini yrkingakapping. Kappingin varð útskrivað í sambandi við Listastevnuna, og vinnararnir vóru kunngjørdir á setanini mikukvøldið.

Áhugin hevur eftir øllum at døma verið øgiligur. Ikki færri enn 126 yrkjarar sendu í alt 426 yrkingar inn.

Í sínari grundgeving nevndi dómsnevndin millum annað, at leitað varð eftir poetiskum spenningi, yrkjarum, sum finna nýggjar metaforar og frástøðan til evni. Málið í yrkingunum skuldi hvørki vera ov danskt eiheldur ov gerandisligt. Og alt hetta hava teir ellivu yrkjararnir, sum eru nevndir aðrastaðni á síðuni, megnað at gjørt. Summir enntá í fleiri førum.

Dómsnevndin er av teirri fatan, at nógvar av yrkingunum er á einum høgum støði, og við vegleiðing kann nógv spennandi spyrjast burturúr hjá góðu yrkjarunum.

Teir ellivu yrkjararnir fáa 5.000 krónur hvør fyri ómakin. Yrkingarnar verða ikki givnar út í bók, men verða lisnar í útvarpi Føroya teir dagarnar, Listastevnan er. Vit hava við loyvi frá Listastevnuni prentað eina av yrkingunum.

### Moving north

Eftir at ein yrking varð lisin, og spennandi kórið Tarira hevði framført, segði Sunnleif Rasmussen nøkur orð. Hann er heiðursforseti fyri Listastevnuna, og hansara uppgáva er at tryggja listarliga støði.

Og eftir hansara tykki kann Listastevnan bjóða list á sera høgum støði. Men tað listarliga høga støði er ikki altíð tað, vit kenna frá stóru miðlunum, helt hann fyri.

So kundu reyðu stólarnir í kykmyndahøllini koma til sín rætt. Filmurin Moving North varð vístur. Filmurin er settur saman av tíggju stuttfilmum. Hvør einar fimm minuttir til longdar, og temaið í øllum er dansur. Og sjálvandi er føroyski dansurin eisini við í hesum norðurlendska samstarvinum. Tað er leikstjórin, Katrin Ottarsdóttir, sum hevur gjørt ein stuttfilm um føroyskan dans. Í hennara filmi sita fyrst nakrar føroyingar og smakka sær á við donskum øli í Keypmannahavn. Eftir at nakað er komið niðurum verður farið upp á gólv. Ein dalbingur við eyðkendari rødd skipar Regin Smið. Filmurin er ein lýsing av føroyska dansinum í stevi, sosialum samanhangi og sangi. Filmurin er sermerktur, og fólk skulu sjálvi sleppa at uppliva filmin og gera sínar egnu metingar.

Men filmurin er ikki helvtina so undarligur sum onkur av hinum filminum í Moving North. Men vit døma ikki um, hvør er betri. Øll Norðanlond uttan Grønland eru umboðaði, og serliga íslendsku filmarnir eru spennandi.

Við tíggju stuttfilmum byrjaði so Listastevnan 2003. Næstu ellivu dagarnir fara at vísa, hvat føroyingar siga um list á sera høgum støði.



*Hann dugir annað enn at stjórna symfoniorkestrum. Martin Mouritsen verður her virðisløntur fyri sínar dygdir sum yrkjara.*
*Mynd: Maria Olsen*

## 11 yrkjarar

Hesir ellivu yrkjararnir fingu virðisløn í yrkingakappingini í sambandi við Listastevnuna:

John Dalsgarð
Sólrún Mikkelsen
Oddfríður Marni Rasmussen
Theodor Eli Dam Olsen
Hans Jácob Kollslíð
Jóngerð Poulsen
Niclas Rasmussen
Bárður Persson
Høgni Egholm
Alexander Kristiansen
Martin Mouritsen

## Modernisma

Modernisma
er ein brotin rútur
sum stendur
og gálvar
eftir tær
tíðliga og seint,
har hugtøk reflektera
í brotum
sum standa
hóttafull eftir,
torir tú inn
torir tú út,
og tú liggur
í andvekri
og telur brotini
og ger støðuna upp
í morgin skal tað verða.
Modernisma
er ein vongbrotin fuglur
sum yvirhálar hinar innanvert,
(halt mær til góðar,
eg visti ikki,
at kaffið var so heitt),
og tú undrast hví
tú ikki hevur ansað eftir tí fyrr
hví júst nú,
eg leggi kortini í skuffuna
áðrenn húsið rapar.
Modernisma
er ein halgidómur
sum fær regnið at tagna
og sílini
sum liggja inni á botni
at skríggja
hvørja ferð SVF
endursendur
gjar og flidna rendur
uttan at nakað hendir
og vónloysið aftur
sjálvt spyr
um tað kann sleppa
til viðgerðar
í harðari kapping
við útsynning
og tað
sum við honum kemur.

*John Dalsgarð*